# Fullsett høll til sangsk

**Høllin á Eiði var fullsett til eina væleydnaða konsert við kórunum frá sangskeiðnum hjá Heimamissiónini, sum var í Nesvík í síðstu viku. Umleið 700 áhoyrarar vóru á Eiði leygarkvøldið**

SANGSKEIÐ

*Orð og myndir:*
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Mestsum allir stólarnir vóru upptiknir og benkurnir í høllini vóru fullsettir til árligu konsertina vóru kórunum frá sangskeiðnum. Heimamissiónin hevur skipað fyri sangskeið síðani 1978, og tað hevur altíð verið góð undirtøka fyri konsertini, sum sangskeiðið altíð endar við. Í ár var konsertin í høllini á Eiði.

Kórleiðari í ár var Ásbjørn Berthelsen av Strondum. Tá ið Sosialurin var á vitjan í Nesvík í síðstu viku, lat hann væl at venjingunum. Ásbjørn hevur vant uttan nótar við kórinum, og tað hevði gingið sera at læra sangirnar. Fólk vóru spent til konsertina, og fleiri lovaðu eina góða konsert.

## Gott barnakór

Fyrst á pallinum leygarkvøldið var barnakórið. Barnakór eru altíð sera sjarmerandi, og hetta kórið var einki undantak. Børnini ikki einans sóu út sum einglar – tey sungu eisini sum einglar. Barnakórið í ár var eitt av teimum betru. Kórleiðarin, Mariann D. Poulsen og tónleikararnir vóru av Strondum. Ungu tónleikararnir dugdu væl, og kórleiðarin er komin væl frá sangvalinum. Eisini var drama til ein sang. Hetta riggaði sera væl. Børnini gjørdu tekin til summar sangir. Solistarnir kláraðu seg eisini sera væl.

Eftir góðu framførsluna hjá barnakórinum, kom stóra kórið á pallin. Tey byrjaðu við einum gomlum gospel sangi "When the Spirit of the Lord". Í hesum sanginum sang kórleiðarin, Ásbjørn Berthelsen, solo. Hetta riggaði sera væl. Ásbjørn syngur væl, og hann megnaði væl at leiða kórið, meðan hann sang.

## Fjølbroyttir sangir

Áhoyrarin fekk at hoyra lívligar sangir og róligar



Kórið syngur av hjarta, meðan Símin Chr. Olsen syngur solo. Ásbjørn Bethelsen dirigerar



Gott hundrað fólk vóru í kórinum. 700 áhoyrarar komu til konsertina leygarkvøldið




Tónleikararnir gjørdu sína uppgávu til vildar hetta kvøldið. Teir eru allir úr bólkinum Proclaim